# Ov spakuliga lýsir í eystri

**Undirtøkan til 1. maidagshaldið hjá arbeiðarafeløgunum er ov lítil, halda fakfelagsfólk. Ov nógv fólk vita ov lítið um tað arbeiðið, fakfeløgini dagliga gera. 1. mai verður sum vanligt hildin í Havn seinnapartin**

ARBEIÐARADAGUR
*Edvard Joensen*



*Undirtøkan til 1. maidagshaldini hevur verið ov lítil seinnu árini, heldur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, sum skipar fyri haldinum á Vaglinum. Í ár fer GHM at spæla undir haldinum tí Havnar hornorkestur er í Skotlandi*

Aftur í ár fer Havnar Arbeiðsmannafelag at skipa fyri 1. maidagshaldið á Vaglinum í Havn. Aðrastaðni úr landinum er ikki frætt frá nøkrum slíkum tiltaki.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, sigur, at 1. maidagshaldið á Vaglinum í ár fer at líkjast tiemum undanfarnu. Uttan tað, at hornorkestrið er skift út í ár.

Trúliga hevur Havnar Hornorkestur møtt upp undir Tinghúsinum at spælt fyri teimum, sum koma saman at lýða á røður og tónleik hesa løtuna. Men í ár er Havnar Hornorkestur í Skotlandi, har tey luttaka í europeiskari meistarakapping fyir hornorkestur, so teimum berst frá.

Men Havnin er væl útgjørd í so máta, so Arbeiðsmannafelagið hevur fingið GHM at spæla ístaðin, sigur hans Joensen.

Sjálvur fer Hans Joensen at vera ein av trimum røðarum á hesum haldinum í ár. Hinir báðir verða løgtingsmenninir Jógvan Arge og Kristian Magnussen.

Tað hevur ikki nakra serliga orsøk, at tveir politikarar halda røðu fyrsta mai í ár, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag. Tað er meira av tilvild, at so er.

Hans Joensen fýlist á, at luttøkan til 1. maidagshaldini hevur verið ov lítil hesi árini. Tað tykist ikki rættiliga, sum fólk leggja nakað í hendan boðskapin, arbeiðarafeløgini royna at fáa út.

– Tað er møguliga tí, at fólk, eisini okkara egnu limir, vita ov lítið um alt tað arbeiðið, sum arbeiðarafeløgini veuliga gera. Eini 95 prosent av tí, gjørt verður, er slíkt, sum ikki beinanveg sæst, vísir Hans Joensen á. Sjálvur hevði eg heldur ikki ímyndað mær, tá eg tók við sum formaður, at tað var so nógv arbeiði í hesum sambandi. Men so er tað aftur fyri okkara uppgáva at upplýsa fólk um hetta, soleiðis at undirtøkan til eitt nú 1. maidagshaldini gerst betri.

Hann vísir á, at eisini limir í Havnar Arbeiðsmannafelag heldur fara á flot ein slíkan dag, enn at fara oman á Vaglið at lurta eftir røðum. Og fólk í øðrum størvum og øðrum feløgum hava vanliga ikki frí 1. mai og eru tískil tarnað soleiðis.

– Men nú fellur 1. mai á ein leygardag í ár, og tá hava øll frí. So kanska tað er betri hesaferð, vónar Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.


WWW.SMYRIL-LINE.COM

Starvsfólk til »Space Control«

**Smyril Line søkir eftir fólki til »Space Control« á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn at byrja sum skjótast.**

Space Control er ein funktión, ið hevur um hendi at leggja inn ferðaætlanir í bíleggingarskipanina hjá Smyril Line, at fylgja við sølutølum og at hava eftirlit við útboði av plássum umborð á M/F Norrönu. Høvuðsmálið er at betra um samlaðu søluna hjá Smyril Line við bíleggingarskipanini.

Starvið vísir til Sølu- og Marknaðarstjóran hjá Smyril Line

**Mest týðandi arbeiðsuppgávurnar eru:**

- Støðugt eftirlit við søluni
- Leggja inn ferðaætlan í bíleggingarskipanina
- Leggja inn prísir (í samstarvi við fyrisitaran av dátugrunninum)
- Samband við søluskrivstovur og søluumboð viðv. bíleggingum
- Útbúgving av sølustarvsfólki til bíleggingarskipanina

Vit vænta, at tú ert sjálvstøðugur, hevur áræði og royndir við bíleggingarskipanum.

Vit vænta somuleiðis, at tú hevur góð samstarvsevni, og at tú ert førur fyri at gera teg galdandi mótvegis seljarum hjá Smyril Line.

Vit bjóða ein persónligan lønarsáttmála við løn í mun til royndir og førleika.

Umsóknarfreistin er mánadagur 10. mai 2004. Umsóknirnar skulu sendast til:

*Smyril Line*
*Postsmoga 370*
*FO-110 Tórshavn*

Merk brævið "Space Control"

Ella við t-posti til *njk@smyril-line.fo*

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sølu- og Marknaðarstjóra, Niels Kreutzmann, á tlf. 345939.

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo


# Onnur eiga eisini dagin

**Tað eigur ikki at forða øðrum fakfeløgum í at halda 1. mai, at dagurin er altjóða arbeiðaradagur, heldur formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag**

1. MAI
*Edvard Joensen*

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, harmast um, at so lítið verður gjørt burtur úr fyrsta mai í Føroyum. Hon heldur, at eisini onnur enn arbeiðarafeløgini áttu at tikið táttin upp.

Hóast dagurin er altjóða arbeiðaradagur, eigur hann eisini at verða hildin sum altjóða solidaritetsdagur, heldur Ingeborg Vinther. Og soleiðis verður hann eisini vanliga hildin aðrastaðni úti í heimi. Har fylkjast øll um hendan dagin. Tey gera hann mestsum til ein veitsludag hjá samlaðu fakfelagsrørsluni.

– So tað hevði einki gjørt, um eisini onnur fakfeløg enn bara arbeiðarafeløgini tóku stig til ymisk tiltøk hendan dagin, sigur leiðarin í størsta føroyska fakfelagnum.

Hon harmast um, at tað ikki eru fleiri 1. maidagshald kring landið enn tað eina, sum regluliga verður hildið í Havn.

Onkuntíð hevur okkurt annað verið, men tað tykist mestsum dottið niðurfyri. Í ár í hvussu er, sigur hon.

Tó verður eitt selrigt hald fyri vaskikonur hildið í Norðurlandahúsinum í kvøld, har Ingeborg Vinther skal halda røðu. Men hetta er av øðrum slagi enn tey siðbundnu 1. maidagshaldini, sigur hon. Her er talan um tilmeldað tiltak, har luttakaranir eisini gjalda fyri at vera við.


Einastandandi tilboð




IDEmøblar
Fyri deilin einans kr. 10,-
Uppi á Hálsi
Tel 35 46 80



MICHELIN
ENERGY



ENN FLEIRI KILOMETRAR VIÐ MINNI BENSIN BRÚKI
MICHELIN Energy
Sosialurin
KEYP TÍNI MICHELIN SUMMARDEKK HJÁ OKKUM
DEKK SENTRIÐ
TEL 320 500


Vikuskifti

Nr. 83 • leygardagur • 1. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Lívið sum yrkisleikari í Arsenal

Ingi Højsted er 18 ára gamal og hevur síðani summarið 2001 spælt við Arsenal



Lesið síðu 4-5



*Seinast Maria Andersen sang alment, var til konsertina hjá dótrini, Lenu, í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ein langtíðar dreymur

Maria Andersen fer í næstum at geva eina fløgu út. Talan er fyri tað mesta um andalig løg, og hon sigur, at hetta er ein langtíðardreymur, sum nú verður veruleiki

TÓNLEIKUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fyri stuttum kom nýggja fløgan hjá Lenu Andersen á marknaðin, og um stutta tíð kemur ein onnur fløga út. Eftirnavnið er tað sama, men fornavnið á hesari er Maria. Tað er mamma Lenu Andersen, sum fer at geva eina fløgu við andaligum tónleiki út.

– Meginparturin verður andaligt, men onkur romantiskur sangur verður tó eisini, sigur Maria Andersen.

Hon sigur, at løg sum Bert ein dag og Dalsins hvíta lilja verða á fløguni. Hetta er sum sagt ein langtíðar dreymur hjá Mariu, sum nú verður veruleiki. Hon fer í upptøkuhølini í komandi viku.

– Eg veit ikki rættuliga, nær fløgan kemur út, men ætlanin er ikki, at tað skal ganga so long tíð, sigur Maria.

Tað er dóttirin, Lena og svigarsonurin, Niklas, sum hava eggjað Mariu til at geva hesa fløguna út.

– Tey hava staðið aftan fyri meg allatíðina hesum viðvíkjandi, og tað verður eisini Niklas, sum fer at taka fløguna upp og orna øll tey praktisku viðurskiftini, greiðir Maria frá.

## Altíð sungið

Maria Andersen hevur altíð sungið. Mamma hennara plagdi at siga, at hon var longu byrjað at syngja, meðan hon sat í barnastóli. Upp gjøgnum barndómin sang hon bæði í kóri og í smærri bólkum. Hennara familja hevur altíð havt nógv við tónleik at gera. Abbi Mariu var við til at stovna harmoniorkestrið GHM í sínari tíð. Og Maria greiðir frá, at mamma hennara er vaksin upp við, at pápin undirvísti næmingum í at spæla upp á ljóðføri í stovuni hjá teimum.

Maria sjálvi minnist eisini væl aftur á barndómsdagar sínar, tá hon plagdi at fara til ommu sína aftan á skúlatíð.

– Omma mín plagdi at syngja sangir ella søgur fyri mær, og mær dámdi tað so væl, sigur Maria Andersen við einum smíli.

## Onnur útgávan

Í 1973 gav Maria út eina LP, sum kallaðist Maria. Hetta er sostatt fyrstu ferð, at Maria gevur út fløgu. Á plátuni vóru tveir føroyskir sangir, og restin vóru á enskum. Hesuferð verða tó allir føroyskir. Tað er ikki ókent fyri Mariu at syngja á útgávum. Hon hevur millum annað sungið á Sangkórsfløguni eisini.

Maria greiðir frá, at nógv er klárt viðvíkjandi útgávuni, so nú skal hon bara takast upp.

– Nú er bara at vóna, at forkølilsið ella nakað annað býtt ikki kemur í vegin, sigur hon spent á málinum.

Maria fer sum sagt í upptøkuhølini í komandi viku, og so skuldi ikki gingið so øgiliga long tíð, til fløgan er á marknaðinum.